## Grønlendingar áskoðarar

Josef Motzfeldt, sum er tingmaður hjá IA og limur í uttanríkis- og trygdarnevndini hjá Landstinginum, er í øðini um, at landsstýrið letur útlendingar taka avgerðir um grønlendskan veðurlagspolitikk, uttan at grønlendingar verða tiknir við upp á ráð. Við KNR sigur Josef Motzfeldt, at landsstýrið hevur ikki megnað at seta sína dagsskrá á økinum, og at hann og aðrir grønlendingar eru ikki annað enn áskoðarar í egnum landi.



*Josef Motzfeldt vil hava Grønland á veðurlagsheimskortið (Mynd: KNR)*

## Sjálvstýrisflokkurin á vitjan í Suðuroynni

Fríggjadagin í hesi vikuni fara tingbólkur og landsnevnd hjá Sjálvstýrisflokkinum á vitjan í Suðuroynni, har ætlanin er at hava Tingstovu og landsnevndarfund. Tingstova Sjálvstýrisfloksins hevur verið væl vitjað og hava fólk verið fegin um møguleikan at heilsa upp á tingbólkin, sigur flokkurin í tíðindaskrivi. Tí er ætlanin at fara kring landið við Tingstovuni, so eisini fólk í útjaðarinum skulu hava høvi at hitta tingbólkin og landsnevndina. Ein av limunum í landsnevndini, Eileen Sandá, er búsitandi í Vági og nýtir landsnevndin tí samstundis høvi at halda landsnevndarfund har suðuri. Á ferðini verður eisini vitjað í Salt Siloni á Drelnesi, við eftirskúlaøkið í Hvalba, á Seglloftinum á Tvøroyri og møguliga eisini í Sandvík.

# Óviljað manndráp og skilaleys koyring

**Ein kvinna er ákærd fyri bæði óviljað manndráp, skilaleysa koyring, rusdrekkakoyring og fleiri onnur lógarbrot eftir eina ferðsluvanlukku á Sandvíkahjalla, har tvey fólk lótu lív**

FERÐSLUVANLUKKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var óvanliga skilaleys koyring, sum á hvítusunnu í fjør, elvdi til eina ferðsluvanlukku á Sandvíkahjalla, sum kravdi tvey mannalív.

Tað heldur Fútin í hvussu so er.

Ein kvinna er nú ákærd í málinum og tað eru rættiliga umfatandi ákærur.

Hon er bæði ákærd fyri óviljað manndráp, fyri serliga skilaleysa koyring, fyri rúsdrekkakoyring og fyri fleiri onnur lógarbrot, verður upplýst av fútaskrivstovuni.

Orsøkin til at hon er ákærd fyri skilaleysa koyring afturat ákæruni um óviljað manndráp, er, at hon hevur sett lív og heilsu hjá fleiri fólkum í álvarsligan vanda.

Málið var fyri í Rættinum í gjár, men verður tikið uppaftur seinni, tí tað eydnaðist ikki at gera tað liðugt.

Í rættarmálinum í gjár, kundi ákærda hvørki játta ella nokta seg seka, tí hon mintust onki til vanlukkuna ella tað, sum varð farið fram.

Men vitni hava greitt frá, at hon koyrdi munandi skjótari enn teir loyvdu 80 kilometrarnar um tíman.

Tey greiddu frá í rættinum, at á veg norðureftir úr Havnini, koyrdi koyrdi kvinnan slalom ímillum bilarnar og hon yvirhálaði fyrst ein bil høgrumegin, tvs í skeivari síðu og síðani yvirhálaði hon ein bil vinstrumegin.

Tá kemur hon yvir í vinstru síðu á vegnum og rennur við nógvari ferð á ein bil, sum kom suðureftir.

Onkur vitni, sum hon hevði yvirhálað søgdu, at hon koyrdi upp á ein máta, so at tey vóru fullgreið yvir, at hetta fór at enda galið.

Tvey fólk í bilinum, sum var á veg suðureftir, lótu lív á staðnum.

Ákærda fekk eisini stóran skaða og varð innløgd á sjúkrahúsi í fleiri mánaðir.

Eitt triðja fólk í bilinum, ein vaksin abba- og ommusonur varð eisini í rættinum og hann var hevði verið noyddur at skifta arbeiði, tí hann fekk mein av vanlukkuni.

Sálarliga hevði hann eisini fingið mein, tí hann var skjótur at fáa herðindi av illsinni og tað hevði hann ikki havt fyrr, men hann var eisini blivin sosialt avbyrgdur, tí hann maktaði ikki so væl at koma ímillum fólk og tí var hann bli



*Løgreglan sigur, at tað var bæði óviljað manndráp, skilaleysa koyring og rúsdrekkakoyring, tá ið tvey fólk lótu lív í eini ferðsluvanlukku á Hvítusunnu í fjør*

# Rimmar barnafestivalur í Havn

**Margarinfabrikkin setir eitt festligt punktum fyri virksemið í ár við einum stórum barnafestivali í Grasagarði**

BØRG OG UNG
*Rigmor Dam*

Alt tað kulasta sum børn og ung dyrka verður á skránni í Grasagarði í Havn leygardagin 5. juli. Hetta siga tey av Margarinfabrikkini, har tey hava úr at gera við at fyrireika Føroya fyrsta festival fyri børn og ung.

Salua Manai, pedagogur, sum er projektleiðari fyri barnafestivalin, sigur, at hetta verður dagurin hjá børnunum. Endamálið er sostatt ikki at vinna pening, men at skipa fyri einum hugnaligum og hátíðarligum degi fyri børn og ung.

Leiðarin í Margarinfabrikkini, Bogi Andreassen rópar eisini tiltakið tivolisligt við poppkorni og candy-floss.

- Tað skal vera ordiliga feitt og kult fyri børnini, sigur hann.

Av tí at árið hjá Margarinfabrikkini endar um hetta mundið, hildu tey, at tey ungu skuldu fáa høvi til at framføra nakað av tí nógva, sum tey hava lært gjøgnum árið.

- Vit hava sett skránna saman, so tað er nakað til allar typur og til allar aldursbólkar, sigur Salua Manai, sum eisini undrast á, at Grasagarður verður so lítið brúktur.

- Hann er ein perla í býnum, sum vit eiga at brúka nógv meira. Á barnafestivalinum verður økið avbyrgt, við tveimum inngongdum, so smá børn ikki kunnu rýma, sigur hon.



*Danska barnastjørnan og MGP vinnari Nikolaj verður stóra navnið á barnafestivalinum í juli*



*Teir báðir Búi Dam og Dánjal á Neystabø fara at framføra Ævintýraferðina*

### Fjølbroytt skrá

Millum tilboðini verða hoppiborg, tarvur og Sumobardagi. Har verður spælipláss við sandkassa og skreiðibana, bál við grillaðum pylsum, sneisabreyði og pannukøkum.

Eisini verður kreativur verkstaður í neðra í Tilhaldinum, har børnini kunnu tekna, mála og gera smýkkur. Teir báðir Búi Dam og Dánjal á Neystabø fara at framføra Ævintýraferðina, og gyklarin Ásbjørn Berthelsen fer at vísa kynstur síni sum búktalari. Eisini verður konsert við Meylu og Jóannes, umframt eitt hip-hop dansishow verður við gentum, sum hava gingið til dansiundirvísing í Margarinfabrikkini í ár, og gentur úr Havnar Fimleikafelag hava fimleikaframsýning. Á barnafestivalinum verður sjálvandi eisini søla av øllum tí, sum tey vaksnu hata: Candyfloss, milkshake, poppkorn, softice og slush-ice. Kortini skulu tey vaksnu eisini hava okkurt gott, tí í miðhæddini í Tilhaldinum verður ein café við lekrum mati fyri tey vaksnu.

### Donsk barnastjørna

Á konsertini kl. 20 spæla tríggir tónleikabólkar frá Margarinfabrikkini, ein gentubólkur og tveir dreingjabólkar. Og til endans spælir danin Nikolaj, sum vann MGP fyri tveimum árum síðani.

Barnafestivalurin er fyri øll børn og ung, og byrjar longu klokkan 10 á morgni. Tiltøkini millum 10 og 18 verða fyri børn og ung, meðan konsertin verður millum 20 og 23. Tiltakið kostar 50 krónur fyri hvørt barn, meðan vaksin sleppa ókeypis inn.